# 73. bind av Varðanum fyri 2006 er komið




BÓKAÚTGÁVA

Í Varðanum hesar ferð skrivar Óla Jákup Niclasen grein við heitinum Jarðarnøvn –hví og hvussu?

Jarðarnøvn hava verið eitt samskiftisamboð til at halda skil á í gerandisarbeiði og til at finna leið frá einum staði til annað. Firouz Gaini hevur grein, sum hann nevnir Mjørki, vatn og stormvindar – brot úr veruligu søgu føroyinga, Hjalmar P. Petersen skrivar um merkingarliga kynstillutan í føroyskum, Freydis Poulsen heldur fram við grein síni um Norðskála søgu, Hanna Simonsen skrivar um føroyskt og óføroyskt, um tillaging ella ikki tillaging av fremmandum máltilfari. Egon Hansen skrivar hesa ferð um húsini við Brunn í Nólsoy og tey fólk sum haðani eru. Marna Jacobsen hevur grein um altjóða krimieyðkenni í skaldsøgunum eftir Jógvan Isaksen.

Trý ummæli eru: Bergur Djurhuus Hansen ummælir bókina hjá Bergi Rønne Moberg: Tá søgan byrjar á staðnum, sum Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur givið út. Turið Sigurðardóttir ummælir bókina¨: "Von Inseln weiss ich..." Geschichten von den Färöern, sum er eitt stórt søgusavn við føroyskum søgum týddar til týskt mál. Til seinast í Varðanum hesaferð ummælir Steinbjørn B. Jacobsen bókina hjá Absalon Absalonsen: Jóan Petur hjá Mouritsi.

73. bind av Varðanum er 181 síður til støddar og kostar 230 kr. í bókabúðunum.

Limagjaldið í Varðanum er 180 krónur um árið, og limir fáa Varðan ókeypis.

## VEÐRIÐ




**Veðrið hetta komandi døgnið**
Útsynningur, 13 til 20 m/s. Turrveður, men skýggjað og mjørki (**!**). Hitin um 10 stig.




**Veðrið hósdagin**
Útsynningur, 13 til 20 m/s, skýggjað og regn. Hitin millum 7 og 10 stig. Út á dagin snarar hann í ein útsynning og vestan við somu vindferð. Hann klárar í, skiftandi skýloft og ælaveður, møguliga sum heglingur. Hitin verður millum 3 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Hann minkar vindin nakað, 8 til 13 m/s av vestri. Skiftandi skýloft við ælaveðri. Hitin um 6 stig. Um náttina veksur hann aftur vindin til 13 til 18 m/s av suðri og útsynningi. Yvirskýggjað við regni, og hitin um 8 stig.

**Veðrið tollaksmessudag og jólaaftan**
Væl av vindi úr útsynningi, 13 til 18 m/s, yvirskýggjað og regn. **Tollaksmessudag** minkar hann vindin nakað til 8 til 13 m/s av útsynningi og vestri, og hann klárar í, kortini við ælaveðri. **Jólaaftan** veksur hann vindin aftur av landsynningi, 10 til 15 m/s, yvirskýggjað við regni. Hitin um vikuskiftið 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 14 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 12 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 10 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Fríggjadagin** fer ein hátrýstryggur fram við oyggjunum, men leygardagin fer eitt eysturgangandi lágtrýst norður um Føroyar. Hetta gevur lýtt veður og regn av suðri og útsynningi.




Eitt lágtrýst við Jan Mayen ferðast í ein landnyrðing. Eitt lágtrýstøki vestanfyri Ísland dýpist spakuliga. Eitt hátrýst yvir Onglandi flytur seg ikki. Lýggj (**!**) og rálig luft rekur inn yvir Føroyar úr útsynningi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/12 kl. $06^{00}$– 20/12. $06^{00}$. Hitin í gjár: 8,8°
Minsti hiti máldur í desember: - 10,5° - Mesti hiti máldur í desember: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 17/12 kl. $06^{00}$– 18/12 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í desember: 50,0 mm




Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

13. desember Mánin longst frá jørðini
20. desember Tendring
28. desember Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Des | 06.57 | 19.23 | 05.57 | 18.23 | 06.12 | 18.38 | 08.57 | 21.23 | 09.57 | 22.23 | 05.12 | 17.38 | 04.12 | 16.38 | 07.12 | 19.38 | 08.12 | 20.38 | 06.42 | 19.08 | 07.57 | 20.23 |
| 22. Des | 07.49 | 20.15 | 06.49 | 19.15 | 07.04 | 19.30 | 09.49 | 22.15 | 10.49 | 23.15 | 06.04 | 18.30 | 05.04 | 17.30 | 08.04 | 20.30 | 09.04 | 21.30 | 07.34 | 20.00 | 08.49 | 21.15 |
| 23. Des | 08.40 | 21.05 | 07.40 | 20.05 | 07.55 | 20.20 | 10.40 | 23.05 | 11.40 | - | 06.55 | 19.20 | 05.55 | 18.20 | 08.55 | 21.20 | 09.55 | 22.20 | 08.25 | 20.50 | 09.40 | 22.05 |
| 24. Des | 09.29 | 21.53 | 08.29 | 20.53 | 08.44 | 21.08 | 11.29 | 23.53 | 00.05 | 12.29 | 07.44 | 20.08 | 06.44 | 19.08 | 09.44 | 22.08 | 10.44 | 23.08 | 09.14 | 21.38 | 10.29 | 22.53 |
| 25. Des | 10.15 | 22.37 | 09.15 | 21.37 | 09.30 | 21.52 | - | 12.15 | 00.53 | 13.15 | 08.30 | 20.52 | 07.30 | 19.52 | 10.30 | 22.52 | 11.30 | 23.52 | 10.00 | 22.22 | 11.15 | 23.37 |